# Ergo-/Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er fulltíðar starv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði er ein fyrimunur
- góð samstarvsevnir
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 5. mars 2002, kl. $14^{00}$.

# SØLUFÓLK til hvítvørudeildina

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnalig/ur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 22. feburar 2002 og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johannesen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johannesen, leiðara.

Elkeyp
**Køksmiðstøðin**
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

# Sálarfrøðingur

Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum avloysari fyri sálarfrøðing í barnsburðarfarloyvi leyst at søkja. Tíðarskeiðið er frá 1. mai 2002 og árið at enda.

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálastýrinum, sum umfram at umsita og at menna sernámsfrøðiliga virksemið í undirvísingarverkinum, skipar fyri og ráðgevur í sambandi við allar sernámsfrøðiligar spurningar og veitir tænastur til børn og ung í aldrinum 0 – 18 ár.

Í Sernámsdeplinum fer fram fjøltáttað sernámsfrøðiligt- og sálarfrøðiligt virksemi. Her er serskúli fyri børn og ung í aldrinum 0 – 18 ár, eygleiðingarbarnagarður fyri børn undir skúlaaldur, taliinstitutt og annað sernámsfrøðiligt virksemi. Sálarfrøðingar í Sernámsdeplinum skipa saman við Landssjúkrahúsinum fyri barnapsykiatriskari konsulenttænastu. Á stovninum arbeiða eini 50 fólk.

Sálarfrøðingarnir taka sær fyrst og fremst av ráðgeving/vegleiðing av foreldrum, lærarum, pedagogum og øðrum fakfólkum og av kanning/viðgerð av børnum og ungum.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**
- Cand.psyk./cand.ped.psyk. – ella samsvarandi
- Fakligan førleika og hug at arbeiða við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar- og viðgerðartilmælum
- Hava hug og evni at ráðgeva/vegleiða øðrum fakfólkum
- Tala føroyskt
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er ein fyrimunur

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til: Sernámsdepilin, Frælsi 32, Postrúm 2036, FO–165 Argir og verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 5. apríl 2002.

Nærri um starvið fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, Sernámsdepilin tlf. 314522.

**Sernámsdepilin**

# Bilsmiðjulærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi til mekaniska verkstað okkara.

Ert tú ágrýtin við áræði og hevur hug til útbúgving innan bilhandverkið, so ert tú møguliga tann, ið vit leita eftir.

Vit bjóða tær lærutíð á sera framkomnum verkstaði við øllum nútímans hentleikum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú 10. floks prógv fólkaskúlans og/ella SIT-prógv og helst koyrikort – so send okkum skrivliga umsókn sum skjótast.

Ford
**P/f Wenzel – Ford í Føroyum**
Akranesgøta 5 - 100 Tórshavn
Att. Anthonius Dalsgaard, verkførari

Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

Advokatskrivstovan Fr. Petersensgøta 9

# SETHÚS til sølu



Sethúsini Óluvugøta 12 verða við hesum lýst til sølu.

Grundøkið er 806 m². Húsini eru totalrenoverað í 1997. Uttanumøkið er gjørt m.a. við tveimum grasvøllum.

Innrættaða gólvvíddin er 222 m² í 2 hæddum og lítil kjallari. Til sethúsini hoyrir bilhús og carportur.

Húsini eru í góðum standi og eru innrættað soleiðis:

Á 1. hædd eru 2 gangir, 1 stórur køkur, 1 grovkøkur, 1 stór stova, 1 wc og 2 verilsir.

Á 2. hædd er ein stór gongd, 4 verilsir og 1 wc.

Stórt ovastaloft, ið er gólvbelagt.

Áhugaðir keyparar kunnu síggja ognina eftir avtalu við undirritaða, sum somuleiðis eisini kann geva fleiri upplýsingar, um hetta ynskist.

Nærri fæst annars at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

## Advokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn
Telefon (298) 311145
Telefax (298) 311525
e-mail: advlaw@advlaw.fo.

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

# Eyka Uppstillingarfundur

til løgtingsvalið verður mikukvøldið 20. februar 2002 kl. 19.30.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9.

**Nevndin**

Sosialurin -har tað hendir



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Skúlavørður

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skúlavørði til Eysturskúlan.

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:
- at røkja bygningar og økið uttan um skúlan
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingerðingina í skúlanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 15. mars 2002. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Eyðdis Baldvinsson, skúlastjóra, tlf. 314752 ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. mars 2002. Viðmerk á umsóknina "skúlavørður".

Í Eysturskúlanum eru 610 næmingar og har starvast 50 lærarar.

SNARSKIVAN

# Giktafelag Føroya

Aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum leygardagin 2. mars 2002 kl. $15^{00}$.

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin fyrilesur Hjalti Gunnarstein frá Tjaldurs Apoteki um evnið:

*"Giktaheilivágur, hvussu kann eg nýta hann betur"*

**Nevndin**

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Fundur

Fundur fyri álitisfólk og leiðarar á dagstovnaøkinum verður á Hotel Hafnia.

**mikudagin 20. februar kl. $13^{00}$.**

**Skrá:** Nýggja lønartalvan

**Føroya Pedagogfelag**
**Boks 318**
**110 Tórshavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur og avloysari søkjast

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til Býlingshúsið á Ternuryggi at byrja 1. mars ella skjótast tilber. Samstundis verður søkt eftir hjálparfólki at avloysa undir sjúku og øðrum.

**Stovnslýsing**
Á stovninum eru 52 børn, 2 barnagarðsstovur og ein vøggustova.Talan er um eitt pedagogstarv í Sóljuni, ið er barnagarðsstova við 20 børnum í aldrinum 3-6 ár. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og har tú fært høvi til at gera tína ávirkan galdandi.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara, ella Hildur D. Samuelsen varaleiðara, tlf 318626.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5 a, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 26. februar 2002.

SNARSKIVAN

# Vágafólk

Ferðavinnan í Vágum sóknast eftir húsum og íbúðum at leiga til ferðafólk í summar.

**Ringið: tlf. 333455 · fartlf. 213455**

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Fundur

Fundur fyri álitisfólk og leiðarar á Serforsorgarøkinum verður á Hotel Hafnia.

**hósdagin 21. februar kl. $10^{00}$ – $17^{00}$.**

**Skrá:** Nýggja lønartalvan
Endurskipan av samstarvsnevnd o.a.

**Føroya Pedagogfelag**
**Boks 318**
**110 Tórshavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

*Endurlýsing:*

# Málsviðgeri til børn og ung

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir málsviðgera til barna- og ungdómsdeildina á mentamáladeildini.

**Mentamáladeildin**
er deild undir trivnaðarfyrisitingini og hevur m.a. umsitingina av dagstovnum, dagrøktini, frítíðarskúlum og Margarinfabrikkini um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið er fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum hesar:
- málsviðgerð-fyrireika mál
- skriva brøv
- fundarfrásagnir
- gera reglur, vegleiðingar og mannagongdir
- samskifta við dagstovnar, frítíðarskúlar, dagrøkt og Margarinfabrikkina
- arbeiði í sambandi við nýggju dagstovnalógina

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving
- hava fyrisitingarligar royndir
- teldukunnleika.
- skal duga føroyskt til lítar
- góð samstarvsevnir
- vera fyrikomandi
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- duga at síggja møguleikar fram um forðingar

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð og verður sett 1. apríl ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmálanum við avvarðandi yrkisfelag.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum, har tú hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. mars 2002.

SNARSKIVAN

# Ársaðalfundur

Alzheimerfelagið boðar til ársaðalfund sunnudagin 10. mars 2002 kl. $15^{00}$ í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Skrá sambært lógum felagsins.

Vanlig uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 2. mars 2002.

Uppskot til lógarbroyting av viðtøkum skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 23. februar 2002.

**Nevndin fyri Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn